# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## BRÚDLEYP

Í dag, 26. juni kl. 13.00 giftast í Sjóvar kirkju Kristina F. Højgaard Johansen av Strondum og Jóni Rasmussen av Skála. Døgurði verður fyri innboðin í Ítróttarhøllini á Skála kl. 17.00. Vælkomst verður eftir kl. 21.00.

Í dag, 26. juni kl. 16.30 giftast í Vesturkirkjuni Majbritt Bisp úr Tórshavn og Alexander Joensen, Undir Gøtueiði. Veitslan verður fyri innboðin kl. 19.00 í kantinuni á Læraraskúlanum.

Í dag, 26. juni giftast í Prestagarðinum á Gjarðanesi Hansa Ottosdóttir, Saltangará og Tummas Símin Høj, Strendur. Døgurði verður í Bygdarhúsinum á Strondum kl. 18.00 fyri innbodnum. Opið hús verður frá kl. 22.00 við drekkamunni, har øll eru hjartaliga vælkomin.

Í dag, 26. juni kl. 16.00 giftast í Godthåbskirkjuni Andrea Vinten, Keypmannahavn og Todi Jónsson úr Klaksvík. Brúdleypsadr.: Restaurant Kongens Have, Kronprinsessegade 13, 1306 Kbh.K.

Í dag, 26. juni kl. 15.00 giftast í Býráðshøllini í Klaksvík, Ragnhild Asbjørnsdóttir Justesen, Klaksvík og Petur Sigurd Justesen úr Hvannasundi.

Í dag, 26. juni kl. 14.00 giftast í Ebenezer Laila Haraldsen av Argjum og Sámal av Reyni úr Tórshavn. Veitslan verður á Reyni Service kl. 18.00.

## 80 ÁR

Í dag fyllur Valborg Jensen, av Sandi 80 ár.

Tey, ið ynskja at heilsa uppá eru vælkomin í Missiónshúsið kl. 15.00-19.00.

## PRÓGV

Jacob Mouritz Olsen, Klaksvík, hevur tann 23. juni 2004 lokið prógv sum Bachelor í samfelagsfrøði á Ålborg Universitet.

Annika Krosstein, Tórshavn:

## Sett sum stjóri í P/F Svend Krosstein



*Annika og Svend Krosstein, stjórar í P/f Svend Krosstein*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Frá 1. juni 2004 er Annika Krosstein sett sum stjóri í P/F Svend Krosstein í Havn, saman við pápanum, Svend Krosstein.

Annika er 39 ára gomul. Hon fór í skrivstovulæru hjá P/F Svend Krosstein í 1982 og tók HH-prógv á Føroya Handilsskúla í 1989. Hon hevur arbeitt sum bókhaldari og á skrivstovuni í fyritøkuni.

Svend Krosstein stovnaði P/F Svend Krosstein í 1966. Fyrstu árini helt fyritøkan til Yviri við Strond. Í 1980 varð flutt í nýggjan virkisbygning á Falkavegi 6, har fyritøkan heldur til.

Svend er í dag 74 ára gamal. Hann ættaður úr Klaksvík og hevur búð í Havn síðan 1956. Hann tók hægri handilsskúlaprógv á Niels Brocks Handelshøjskole í Danmark í 1955, og var eitt ár í London har hann gekk á handilskúla og arbeiddi sum skrivstovumaður.

Frá 1956 til 1966 arbeiddi hann sum bókhaldari hjá P/F Thomas Dam í Havn.

P/F Svend Krosstein er bæði heil- og smásøla sum selur alt innan vatnveiting, kloak, hitaverk, sanitet og ventilatión. Harumframt er eisini eitt stórt úrval av veiðireiðskapi til brúks á sjógvi og landi. Í løtuni eru 20 starvsfólk í fyritøkuni.

## Hansina Larsen 80 ár


*Mynd: Jan Müller*

Jóansøkudag 24. juni fylti Hansina Larsen í Havn 80 ár.

Hansina er ættað úr Kvívík. Foreldrini vóru, Súsanna Kathrina, nevnd Kinna, av Eystaruhellu í Kvívík, og Petur Joensen, av Skælingi.

Hon giftist jóansøkudag 1950 við Helmuth Larsen, gróthøggarameistara (1921-1985), úr Keypmannahavn.

Helmuth Larsen kom til Føroyar í februar 1946. Hann var boðsendur av Føroya Mekaniska Grótidnaði til at høgga standmyndina av V.U. Hammershaimb, á Debesartrøð, í føroyskt grót, eftir modelli av Janusi Kamban, listamanni. Hetta arbeiðið gjørdi Helmuth saman við faðir sínum, Lars Larsen, gróthøggara, sum var staddur í Føroyum.

Í 1967 stovnaði Helmuth Larsen sítt egna grótvirki í Havn. Virkið sum í dag eitur Grótvirkið Helmuth Larsen.

Børnini hjá Hansinu og Helmuth eru: Høgni, Gisla, Annika og Ingun, sum øll búgva í Havn.

Hansina eigur 9 ommubørn og 2 langommubørn.

Napoleon Smith og Ari av Rana:

## Doyptir í Sandágerði


*Napoleon Smith og Ari av Rana vóru doyptir í Sandágerði seinasta mikudag*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

Mikudagin 23. juni var dópur í Sándágerði í Havn. Tað var samkoman Lívdin í Hoyvík, sum skipaði fyri.

Nógv fólk vóru komin saman á sandinum. Jógvan Zachariasen, leiðari í samkomuni, segði nøkur orð, ein sangur bleiv sungin, og síðan fór dópurin fram.

Tað vóru havnardreingirnir Ari av Rana, 17 ár, og Napoleon Smith, 16 ár, sum vórðu doyptir.

Hetta er ikki fyrstu ferð at dópur er farin fram í Sandagerði.



# So varð hetta tíðarskeiðið liðugt


*Mynd: Jens Kristian Vang*

"

*...-inni við tað myrkagrøna, næstan brúnliga kjarrið, gekk ein einsamøll meyra. Tað var Magnifik Meyra Miro... Hann var komin til eitt vegamót. Ein krossveg, ið fór sundur í ikki færri enn átta vegir. Bangin hugdi hann rundan um seg og alt í einum varnaðist hann, at hann ongantíð áður hevði upplivað, at eingin onnur meyra var í eygsjón. Fyri fyrstu ferð nakrantíð var Magnifik Meyra Miro púra einsamallur. Fjálturstungin vendi og snaraði hann høvdinum. Hann gekk nøkur fet, men vendi beinanvegin við og stillaði seg aftur í miðjuna, har vegirnir møttust. Valið ørkymlaði hann, og hann segði við seeg sjálvan: "Meyra, tú kanst ikki ganga eftir átta gøtum samstundis".*

***Pisurøðan***

*...Hugburður okkara er ofta: "Eg eri bert ein lítil partur av teirri stóru heildini; tí havi eg onga ávirkan". Men vit áttu heldur at spurt, hvat heildin var uttan smáu partarnar...*

***HF-røðan***

*...Franski heimspekingurin, Descartes, segði: "Eg hugsi, tí eri eg." Spurningurin er so , um vit, sum nú verða liðug, kunnu siga: "Vit hugsaðu, og tí verða vit til nakað"...*

***HF-røðan***

*...Menniskju verða fødd óvitandi, men ikki býtt. Tey verða gjørd býtt ígjøgnum sína útbúgving...*

***Bertrand Russel, HF-røðan***

*...Klekir skúlaskipan okkara pisur, sum tora og duga at hugsa sjálvstøðugt, ella klekir hon pisur, sum allar hava sama hugburð og tískil allar flúgva somu leið í stórum trunka?...*

***HF-røðan***

"

**Nógv fólk var komið saman í plantasjuni hósdagin, fyri at hoyra og heiðra studentar og HF'arar. Sólin strálaði um kapp við nýklaktu pisurnar, og gjørdi sjálvsagt sítt til, at fundurin eydnaðist so væl**

PISUFUNDURIN 04

*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

Afturvendandi tiltakið, við at hava pisufund í plantasjuni, er eftirhondini vorðin ein inngrógvin siður.

Fundurin hevur tó verið hildin nógva ymsa staðni í plantasjuni, og fyrireikararnir í ár høvdu aftur valt at flyta røðarapallin til eitt nýtt stað. Hin so eyðkendi røðarapallurin, við føroysku litunum, ið vit kenna best frá Vaglinum, var í ár ikki nýttur. Ístaðin vórðu talurnar hildnar av einum kletti, ið liggur niðan ímóti nonnuskúlanum. Hetta riggaði avbera væl.

Fyrsta, sum fekk orðið var Marjun Kjelnæs, sum var gestarøðari.

Síðani kom Katrin E.L. Jacobsen, ið helt studentarøðuna. Saman við Benvør Ferjá Eyvindsson, Sunnevá Bech og Bjarna í Liða, hevði hon skrivað røðuna.

Ì hesi røðuni var dentur serliga lagdur á valið, ið má koma eftir trý ár í Hoydølum. Nógvir vegir eru, sum kunnu verða valdir, men alneyðugt er at velja ein veg, sum førir við sær frælsi at vera tann, tú er. Røðan minti pisurnar á, at við studentspróvnum fylgir ein ábyrgd, tí trý ára skúlagongdin er ein íløga, sum samfelagið ger í ungdómin.

HF røðan varð hildin av Janus á Ryggi, sum hevði skrivað røðuna saman við Boga Hjalt. Hetta var ein øðrvísi røða enn hinar undanfarnu. Har hinar vóru bókmentakendar, við nógvari myndatalu, var hendan meiri faktakend, við nógvum endurgevingum. Hon viðgjørdi nútíðarsamfelagið, eisini nevnt vitanarsamfelagið og nútíðarmenniskjað, eisini nevnt sjálvsøkna menniskjað. Nevnd vórðu nøkur dømi, Ghandi, móðir Theresa og Martin Luther King, ið megnaðu at liva eitt ósjálvsøkið lív, og sum enn í dag eru vitni um, at ikki er neyðugt at verða sjálvsøkin, hóast livað verður í vitanarsamfelagnum. Røðan var eisini um at tora at taka ábyrgd og hugsa sjálvstøðugt.

Nýklaktu pisurnar og hf'ararnir fingu sostatt nøkur álvarsorð og góð ráð frá røðuhaldarunum, at hava við á leiðini framyvir. Ein stak góð løta í Viðarlundini, sum aftur í ár hevði ein so serstakan dám, merktan av gleði, men eisini av sorgblídni. Tí so varð hetta tíðarskeiðið liðugt.


*Mynd: Jens Kristian Vang*